# Gundurs Bussar nýggjan Volvo




*Gundur Johannesen frá Sp/f Gundurs Bussum fær her bussin handaðan av Marna Olsen og Torleif Nón frá VR Bilum*
*Mynd: Bárður*

**Hósdagin 19. mai læt bilasølan VR Bilar enn ein nýggjan Volvo millumbygdabuss til Sp/f Gundurs Bussar á Signabø, sum rekur bussrutuna millum Havnina og Kollafjørð fyri Tórshavnar Býráð**

BUSSAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Sp/f Gundurs Bussar á Signabø fingu í síðstu viku ein nýggjan Volvo B12M buss til bussleiðina millum Havnina og Kollafjørð.

Bussurin er uppbygdur hjá Carrus verksmiðjuni í Finlandi. Bæði ramman og karossaríið eru úr rustfríum stáli.

Talan er um ein "Carrus 8700", men tekniskt er hann ein Volvo B12M við motorinum í miðjuni. Motorurin er ein 12,0 litur 6 syl. turbodiesel við v. commonrail og intercoolara. Girkassin er heilautomatiskur við retardara.

Bussurin er uppbygdur sum ein millumbygdabussur við 49 sitiplássum og 23 standiplássum til tey ferðandi.

Eins og aðrir nýggir bussar hevur hesin skivubremsur bæði framman og aftan og ABS bremsuskipan við ESP, so hann ikki glíður út í svingum.

Nýggjastu bussarnir eru so framkomnir og hava so nógvar trygdarskipanir, ið kemur bæði bussføraranum og teimum ferðandi til góðar, sigur Gundur Johannesen á Signabø, sum eigur og rekur Sp/f Gundurs Bussar. Hesin bussurin er tann fimti í røðini, hann hevur keypt frá VR Bilum.

# Reyni Service lýsingarskelti við Ringvegin




*Reyni Service hevur nú fingið eitt lýsingarskelti við Ringvegin í Havn við ymiskum lýsingum og tilboðum hjá fyritøkuni*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Stóru lýsingarskeltini, har lýsingarnar skifta við jøvnum millumbili, eru nú at síggja nógvastaðni í Havn. Á økinum hjá Reyni Service við Ringvegin er nú eitt sketi sett upp við lýsingum hjá fyritøkuni**

BILFYRITØKA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Reyni Service hevur nú fingið eitt lýsingarskelti við Ringvegin í Havn, á økinum teir herfyri keyptu frá P/F Meinhardt Arge.

Í løtuni koyra tríggjar ymiskar lýsingar, ein um bilútleigan, ein um upprætting og lakkering av bilum, og ein um Corolla 25 átakið, ið samband við at 25 ár eru liðin, síðan Reyni Service fekk umboð fyri Toyota.

Ætlanin er, at lýsingarnar verða skiftar út fjórðu hvørja viku við ymiskum lýsingum og tilboðum hjá fyritøkuni, sigur stjórin hjá Reyni Service, Eivind av Reyni.